DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

# Vetrardekk




**Goodyear Ultra Grip 7+**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **980,-**
205/55-16 ...... **1.375,-**




**Continental TS830**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **990,-**
205/55-16 ...... **1.290,-**

# Komplet vetrarhjól

**– 15" ella 16" felgur við vetrardekkum**



**15" felgur við TS830**

**Kr. 6.900,- fyri settið**
Dekkstødd: 195/65-15
Felgurnar fáast til flestu bilmerki



**16" felgur við TS830**

**Kr. 8.400,- fyri settið**
Dekkstødd: 205/55-16
Felgurnar fáast til flestu bilmerki

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

TVØROYRAR KOMMUNA



## Stuðlar til Suðuroyar Barnaverndartænastu

Suðuroyar Barnaverndartænasta ætlar at stovna eitt stuðulstoymi, ið skal arbeiða við børnum og familjum, ið hava tørv á hjálp. Í hesum sambandi verður, treytað av játtanini, søkt eftir 2-3 starvsfólkum at byrja 1. januar 2009.

Stuðulstoymið tekur við í staðin fyri teir núverandi stuðlar í barnaverndini, og fara at hava uppihaldsstað hjá barnaverndarumsitingini á Tvøroyri, har man eisini møtast hvønn dag. Arbeiðið hjá stuðulstoyminum verður lagt til rættis í samráð við leiðaran og avvarðandi málsviðgerða í barnaverndarumsitingini umframt viðkomandi familju.

Talan er um 3-4 fulltíðar størv. Arbeiðstíðirnar verða ymiskar, roknast kan við, inn í millum, at skula arbeiða uttan fyri vanligar arbeiðstíðir.

Stuðlarnir skulu vera við til at gera umstøðurnar hjá tí einstaka barninum/familjuni, so góðar sum tilber, so barnið kann mennast á ein fullgóðan hátt.

Stuðlarnir arbeiða tætt saman við familjuni og arbeiðið fer í nøkrum førum fram í heiminum hjá familjuni.

Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvar fakbólkar m.a. innan námsfrøði, sálarfrøði og innan undirvísingarøkið. Tú skalt taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum – gomlum sum nýggjum – og virkisøkið verður innan karmarnar av barnaverndarlógini.

Tað er týdningarmikið at tú sum stuðul dugir at tillaga teg, samstarva, ert opin, jaligur og hevur tol. Tú mást duga at síggja møgulleikar fram um mørk, so børnini/familjan fær avbjóðingar í degnum.

**Vit vænta at tú:**
- hevur hóskandi útbúgving ella royndir (t.d., pedagog, lærari, sjukrasystur el.líkn.)
- ert fleksibul og hevur góð samstarvsevni.
- ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiði tínum.
- hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum, tú arbeiðir við.
- ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.

Innlit í og royndir frá barnaverndararbeiði/arbeiði við børnum og/ella familjuráðgeving kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og fyri sjálvstøðug/ur at tilrættisleggja tínar arbeiðstíðir
- Skiftandi arbeiðstíðir kunnu koma fyri.
- Møguleika fyri at fáa ta útbúgving/eftirútbúgving, ið skal til
- Løn sambært sáttmála við pedagogfelagið.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til: Tvøroyrar Kommunu, Suðuroyar Barnaverndartænasta, Tvørarv. 37, 800 Tvøroyri. Mrk. Stuðlar til barnaverndartænastan, og skal vera barnaverndini í hendi í seinasta lagi hin 05. dec. 2008 kl. 12.00.

Um ivamál eller spurningar eru vinaligast setið tykkum í samband við Susanne Madsen ella Jónleyg Eyðunsson á tlf. 372085, kl. 9.00 -10.30 ella send ein teldupost til susanne@tvoroyri.fo, jonleyge@tvoroyri.fo.

**ókeypis.fo**

***...fá meira fyri einki!***

Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

# Tiltøk í desember 2008

**Framsýningin "Við lív og sál" úr Bornholm er í Klingruni**
ACAB (Arts & Crafts Assosiation Bornholm)

| Dagur | Dato | Tiltøk | Kl. |
|---|---|---|---|
| Mikud. | 3. | **Meginfelag Teirra Brekaðu** MBF: Ráðstevna | 09.00-15.00 |
| Hósd. | 4. | **Føroya Tele,** vinnulívskundadagur | 12.00-17.30 |
| Fríggjad. | 5. | **Barnadansur** v/Dansifelagnum í Havn og NLH *Síðsta kvøld áðrenn jól, ókeypis* | 20.00-21.00 |
| Fríggjad. | 5. | **Evnisdagur um vinnugransking: Vinnumálaráðið** Skálin | 10.00-17.00 |
| Leygard. | 6. | **Jólafamiljukonsert í Runavík:** Føroya Symfoniorkestur, atgm. kr, 75,00 | 16.00 |
| Leygard. | 6. | **Bókadagur 2008** | 13.00-17.00 |
| Sunnud. | 7. | Finskur Tjóðdagur | |
| Sunnud. | 7. | **Jólafamiljukonsert á Nabb:** Føroya Symfoniorkestur, atgm. kr. 75,00 | 16.00 |
| Sunnud. | 7. | **Barna- og barnabókatiltak "Bókadagur 2008"** | 13.00-17.00 |
| Mánad. | 8. | **Tóroddur Poulsen og Claus Cartensen: Framsýning, upplestur og videoverk** Filmurin: "Ein regla um dagin má vera nokk" verður eisini sýndur, atgm. kr. 50,00 | 19.00 |
| Mikud. | 10. | **Amnesty International Føroya deild Fyrilestrar, filmur Konsert:** Guðrið Hansdóttir, The Ghost, Lena Anderssen og ORKA, atgm. kr. 150,00 | 20.00 |
| Leygard. | 13. | **Luciukonsertin 2008:** Tórshavnar Musikkskúla, atgm. kr. 40,00 (ÚTSELT) | 16.00 |
| Leygard. | 13. | **Eykakonsert** | 18.00 |
| Sunnud. | 14. | **Húsið er stongt til 29. des.** | |
| Mánad. | 29. | **Føroya Fiskimannafelag, ársfund** | 08.30-17.00 |
| Týsd. | 30. | **Skipara- og Navigatørfelag, ársfund** | 09.00 |
| Mikud. | 31. | Nýggjársaftan húsið stongt. Opið verður aftur fríggjadagin 2. januar 2009 | |

*Broytingar kunnu koma fyri!*

***Norðurlandahúsið ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýttár!***

***Nærri kunning um tiltøkini á okkara heimasíðu www.nlh.fo***

***Broytingar kunnu koma fyri!***

**Norðurlandahúsið er opið**
mánadagar – leygardagar kl. 10.00-18.00
sunnudagar kl. 14.00-18.00.

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Tel 351351 · Fax 315350 · www.nlh.fo · nlh@nlh.fo